# Tollarar við tagnarskyldu

*Lagt til røttis: Rigmor Dam*
*Myndir: Sunva Eysturoy Lassen, Polfoto*

**Summi ræðast tollararnar so illa, at tey aftra seg við at bíleggja persónligar vørur, so sum sexleikur ella undirklæðir, úr útlandinum. Men Taks bedýrar fyri Rákinum, at frá teimum lekur onki út.**

**– Fólk kunnu vera púra trygg. Vit hava víðkaða tagnarskyldu, og vit síggja so nógv, at vit síggja onki, vissar Hermann í Stórustovu, deildarleiðari hjá Taks.**



*Fyri starvsfólkini hjá Taks eru sexleikur somikið vanligar, at tey geva sær als ikki far um tær.*

Á skrivstovuni hjá Taks á Óðinshædd kom ein nýggj sending av brøvum heim í morgun. Stakkar av tjúkkum brøvum og smáum pakkum liggja allastaðni: á skriviborðum, á gólvinum og í rullivognum. Hetta eru ikki vanlig brøv, men tjúkkir brævbjálvar við gávum ella vørum, sum tollararnir skulu avgreiða, áðrenn teir verða latnir móttakarunum.

Við hvørt skrivaraborð sita starvsfólk og lata brøvini upp, kaga niðurí, og skriva niður á oyðubløð, sum verða send móttakarum kring alt landið.

### Sneyta í brøvini

Eina løtu kennist tað sum eru vit stødd handan jarntjaldið. Tí hvat billa tey sær í roynd og veru inn at sneyta í privatu brøvunum hjá okkum føroyingum? Og hvussu er statt við tagnarskylduni hjá hesum skrivstovufólkunum, sum kenna hvønn ein dildo, sum føroyingar bíleggja sær? Hví skal hetta irriterandi grøna klistrimerkið latið upp av tollvaldinum sita á brøvunum?

Vit hava biðið deildarleiðaran á Taks í Tórshavn, Hermann í Stórustovu, forklára okkum um hendan dulda heimin, sum vit finna millum sendara og móttakara.

Hermann leggur fyri við at staðfesta, at tollarar hava ikki bara tagnarskyldu, men herda tagnarskyldu, eins og bankafólk og læknar.

– Fólk kunna líta 100 prosent á okkum og púra trygt bíleggja hvat sum helst, bara tað ikki er ólógligt, sigur Hermann í Stórustovu, sum sigur seg ongantíð hava fingið klagur um, at starvsfólk hava brotið tagnarskylduna.

– Vit síggja so nógv, at vit síggja onki! Fólk bíleggja alt millum himmal og jørð, og tað er ikki tí, at vit halda tað vera so stuttligt at fáa innlit í privatlívið hjá fólki, sigur Hermann í Stórustovu, sum eisini kennir ein útveg fyri allar partar: Móttakarin skal biðja sendaran hefta fakturuna uttan á brævið so verður onki latið upp!

### Men hví lata tit brøvini upp?

– Lógin áleggur okkum at tolla allar vørur oman fyri eitt ávíst virði. Men á nógvum brøvum og smápakkum við vørum, sum fólk hava bílagt, er ongin faktura á. Var hon á, varð sendingin avgreidd beinanvegin uttan at verða latin upp. Men tá hon ikki situr uttaná, leita vit eftir henni inni í pakkanum, so sendingin kann verða avgreidd skjótast gjørligt. Tá kunnu vit eisini staðfesta, um talan er um tollfríar vørur. Um postverkið í staðin skal senda fráboðan út til móttakarin um, at fakturan manglar ella liggur innií, seinkar tað avgreiðsluni óneyðuga nógv, eisini fyri móttakaran, greiðir Hermann í Stórustovu frá.

Hann sigur víðari, at munur er á brøvum/smápakkum og pakkum. Á pakkum er altíð eitt adressukort og al oftast ein faktura, og tí er ikki neyðugt at lata teir upp.

Men í sambandi við brøv og smápakkar, ið ofta eru vørur, sum privatfólk hava bílagt, skal tollvaldið meta um, hvørt innihaldið kanska skal tollast, ella um talan kanska er um ólógligar vørur.

– Liggur rætt útfyltur fylgiseðil uttaná, verður brævið ikki latið upp, men tollavgreitt sambært upplýsingunum á fylgiseðlinum. Tí skulu fólk heita á tey, sum tey bíleggja frá, til dømis á internetinum, um at hefta fakturuna uttan á brævið. So verður ein fráboðan send móttakaranum, sum so kann heinta vøruna og rinda tollin her hjá Taks, sigur Hermann í Stórustovu.

### Visa-kortið á internetinum

Fólk, sum keypa vørur umvegis internetið, rinda ofta fyri vøruna beinanvegin við Visakorti. Tá liggur heldur ikki faktura uttan á brævinum, tí hon verður send við telduposti. Tá hendir ofta tað, at tey skulu renna frá Pontus til Pilatus fyri at fáa vøruna útflýggjaða.

– Eisini í hesum førinum er orsøkin, at ongin faktura liggur við. Men vøran skal tollast, og tí hava vit brúk fyri fakturuni, sum upplýsir, hvat vøran kostaði. Tí verða fólk send heim eftir fakturuni, sigur Hermann í Stórustovu. Vilja fólk tá hava vøruna útflýggjaða beinanvegin, skulu tey rinda eitt eykagjald upp á 150 krónur til postverkið fyri skjóttolling.

– Annars mugu tey bíða til dagin eftir, tá tey fáa eina fráboðan sendandi frá postverkinum, sigur Hermann í Stórustovu, sum viðgongur, at hetta er rættiliga tvørligt.

– Men ætlanin er at fremja umfatandi broytingar í sambandi við tolling av innflutningi til privatkundar.

– Broytingar, sum fara at lætta munandi um hjá brúkarunum, sigur tollarin at enda.

**Hvussu eitur ein dildo hjá nýggja Toll og Skatt? – Ein tilTAKSlimur ...**



*Hvat man vera í hesum pakkanum?*